# Almannamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 05. juli. 2021 |
| Mál nr.: | 21/00124-22 |
| Málsviðgjørt: | HP |
| Ummælisfreist: | 6. juli til 27. aug. 2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**
(Longt tíðarskeið, perssónsskari til sjálvbodna trygging, dagpeningur í sambandi við framskundaða- og útsetta pensjón o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. juni 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 143 frá 9. oktober 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3 verður aftaná stk. 4. sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 5*. Persónur, sum lýkur treytirnar í § 25, stk. 1 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, hevur ikki rætt til dagpening vegna sjúku."
Stk. 5 verður eftir hetta stk. 6.

**2.** § 4 verður orðað soleiðis:
"Rætt til dagpening hevur persónur frá tí degi, hann er fyltur 16 ár. Hesin rættur dettur burtur frá 1. í mánaðinum eftir, at viðkomandi hevur móttikið fólkapensjón ella hevur fingið tillutað hægstu fyritíðarpensjón ella framskundaða pensjón við eini upphædd svarandi til hægstu fyritíðarpensjón".

**3.** Í § 5 verða aftaná stk. 2, sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 3*. Um tað verður mett ósannlíkt, at persónur í fólkapensjónsaldri, sum ikki móttekur fólkapensjón, hevur endurvunnið fult arbeiðsføri, áðrenn freistina sbrt. § 12, stk. 2, steðgar veiting sambært hesi lóg beinanvegin.
*Stk. 4*. Metingin sambært stk. 3 verður gjørd við støði í eini læknaligari meting. Metingin verður gjørd í sambandi við játtan og síðani hvørja 8. viku, at viðkomandi fær dagpening vegna sjúku."

**4.** § 12 verður orðað soleiðis:
"Útgjaldingin av dagpeningi heldur uppat, tá móttakarin aftur er arbeiðsførur, uttan mun til, um hann fer í vinnu aftur ella ikki.
*Stk. 2*. Dagpeningur verður í mesta lagi veittur í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði.
*Stk. 3*. Hóast stk. 2 kann dagpeningur verða veittur í longur enn 52 vikur í hesum málum:
1) tá persónur hevur álvarsliga ella lívshættisliga sjúku ella hevur verið fyri skaðatilburði, har tað ikki ber til at siga, um viðkomandi verður varandi sjúkur ella aftur vinnur sær arbeiðsføri,
2) tá persónur í sambandi við álvarsliga sjúku ella skaða er í viðgerð, og har tað er sannlíkt, at viðkomandi aftur vinnur fult arbeiðsføri,
3) tá talan er um mál um arbeiðsskaða, sum er fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum, og sum verður viðgjørt eftir løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin).

*Stk. 4*. Dagpeningur veittur sambært stk. 3, nr. 3, kann í mesta lagi verða veittur í 2 ár.
*Stk. 5*. Stk. 3 fevnir ikki um persón í fólkapensjónsaldri."

**5.** § 14 a verður orðað soleiðis:
"Stjóri í felag kann tryggja sær dagpening sambært hesari lóg frá 1. fráverudegi.
Stk. 2. Stjóri í felag kemur undir stk. 1, um:
1) felagið hevur avmarkaða ábyrgd fyri eigaran í felagnum,
2) at stjórin burturav ella í mestan mun hevur sína inntøku frá felagnum,
3) at samlaða lønarútreiðslan hjá felagnum seinast álíknaða inntøkuár í mesta lagi er 390 ferðir hægstu dagpeningaveiting um vikuna,
4) at stjórin ikki á annan hátt hevur rætt til løn undir sjúku.

**6.** Í § 15, stk. 1 verður "egnum" strikað.

**7.** Í § 25, stk. 1 verður "Kærunevndina í almanna- og heilsumálum" broytt til: "Føroya Kærustovn".

**§ 2**

*Stk. 1*. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022.
*Stk. 2*. Persónur, ið móttekur dagpening vegna sjúku, tá henda løgtingslóg kemur í gildi, er fevndur av hesi løgtingslógini.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Hetta uppskotið inniheldur fleiri ymiskar broytingar, sum hava ymisk endamál, og sum ikki eru tengdar at hvørjum øðrum. Talan er bæði um broytingar, sum betra um rættindi hjá borgarum og um konsekvensbroytingar av aðrari lóggávu o.a.

Broytingarnar eru hesar:

1. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við ansing av avvarðandi verður flutt frá løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. (dagpengalógini) til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (almannalógina),
2. Framskundað pensjón verður javnsett við fyritíðarpensjón í dagpengalógini.
3. Longt dagpeningatíðarskeið,
4. Persónur við útsettari pensjón fær rætt til dagpening,
5. Stjórar í smærri feløgum, sum hava nakað av arbeiðsmegi aftrat sær, verða eisini fevndir av sjálvbodnu tryggingarskipanini,
6. Konsekvensbroyting av at kærumyndugleikin ætlandi umskipar sítt virksemi.

*1.1.1 Persónur, ið lýkur treytir í dagpengalógini og almannalógini*

Í almannalógini kann endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku verða veitt í sambandi við ansing av børnum, sum bera brek ella við varandi sjúku, og til persónar yngri enn 67 ár við seinheilaskaða og persónum yngri enn 67 ár, sum eru doyggjandi heima. Grundreglan í almannalógini er, at onnur lóggáva kemur framum. Hevur ein persónur rætt til stuðul ella veiting eftir aðrari lóggávu, tá dettur rætturin til veiting eftir almannalógini burtur.

Nakrir persónar hava rætt til veiting bæði eftir dagpengalógini og § 25, stk. 1 í almannalógini. Í hesum førum er tað dagpeningur vegna sjúku, sum verður veittur, og sostatt hevur persónurin ikki rætt til endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku eftir almannalógini. Rættindini sambært almannalógini eru í ávísum førum betri enn sambært dagpengalógini. Persónur, sum fær dagpening vegna sjúku, kann sostatt verða stillaður verri enn persónur, sum fær endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku eftir almannalógini, hóast umstøðurnar eru nærum tær somu.

*1.1.2 Framskundað pensjón og dagpeningur vegna sjúku*

Persónur, sum fær hægstu fyritíðarpensjón, hevur ikki rætt til dagpening vegna sjúku. Orsøkin er, at pensjónin verður veitt, tí persónurin ongan arbeiðsførleika hevur eftir, og pensjónin er sostatt ein kompensasjón fyri mista arbeiðsinntøku.

Við løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018 er framskundað pensjón sett í almannapensjónslógina. Persónur við skerdum arbeiðsføri, sum hevur nátt ávísan aldur, kann fáa rætt til framskundaða pensjón. Hevur persónurin onki arbeiðsføri eftir, fær hann framskundaða pensjón, har veitingin er svarandi til hægstu fyritíðarpensjón. Talan er sostatt um persón, sum er í somu støðu sum ein hægsti fyritíðarpensjonistur. Sambært løgtingsmáli nr. 67/2017 er talan um sama málbólk sum fyritíðarpensjonistar, men munurin er, at tey við framskundaðari pensjón skulu hava skjótari málsviðgerð í sambandi við umsóknina. Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at rættindi í sambandi við dagpening vegna sjúku skulu vera øðrvísi enn hjá fyritíðarpensjonistum. Neyðugt er tí at konsekvensbroyta løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.

*1.1.3 Longt dagpeningatíðarskeið*

Persónur, sum er langtíðarsjúkur og harvið óarbeiðsførur, og har óarbeiðsførið ikki kann staðfestast at vera varandi, er ikki nóg væl tryggjaður í føroysku almannalóggávuni og dettur niðurímillum ymsu skipanirnar. Sambært galdandi lóg kann dagpeningur vegna sjúku í mesta lagi veitast í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði. Tað er ikki óvanligt, at persónur t.d. við krabbameini er óarbeiðsførur í longur tíð enn 9 mánaðir, og viðkomandi er tá ikki tryggjaður inntøku. Umframt heilsuligu avbjóðingarnar kann støðan sostatt eisini blíva til ein fíggjarligan smeit fyri sjúklingin.

*1.1.4 Útsett pensjón og dagpeningur*

Persónur, ið útsetir fólkapensjónina, hevur sambært galdandi lóg ikki rætt til dagpening vegna sjúku, og hesin persónurin kann tískil koma fyri at missa ein stóran part av inntøkugrundarlagnum, um hann gerst sjúkur.

*1.1.5 Stjórar í smærri feløgum*

Stjórar í smærri feløgum, sum ikki eru fevndir av sjálvbodnu tryggingini hjá Almannaverkinum, eru ikki nóg væl tryggjaðir í sambandi við sjúku. Ein stjóri í eini fyritøku kann koma í støðuna, at inntøkan heilt dettur burtur, um hann verður raktur av sjúku. Ein álvarslig sjúka kann sostatt eisini blíva til ein álvarsligan fíggjarligan trupulleika hjá viðkomandi og hjá fyritøkuni.

Dagpeningalógin tók upprunaliga støði í, at stjóri í t.d. einum partafelag kann tryggja seg við at avtala rætt til løn undir sjúku hjá sínum arbeiðsgevara. Men í fleiri smærri fyritøkum er hetta í roynd og veru ikki ein møguleiki, tí ein stórur partur av inntøkuni hjá fyritøkuni stavar frá arbeiðinum hjá stjóranum, og smærri feløg hava ofta ikki fíggjarliga styrki at bera eina longri sjúkrafráveru hjá stjóranum.

*1.1.6 Kærumyndugleikin broytir sítt virksemi*

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroya Kærustovn hevur verið til ummælis, og ætlandi verður virksemið á Føroya Kærustovni umskipað. Í tí sambandi skal dagpeningalógin konsekvensbroytast.

## 1.2. Galdandi lóggáva

*1.2.1 Persónur, ið lýkur treytir í dagpengalógini og almannalógini*

Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku í sambandi við ansing av avvarðandi, sum eru sjúk, kann veitast bæði eftir dagpengalógini og eftir almannalógini. Veitingarnar eru í ávísan mun til ymisk endamál, og tí er neyðugt við ásetingunum í báðum lógunum. Men tað eru persónar, sum lúka treytirnar í báðum lógunum, men ein persónur kann ikki móttaka veiting eftir báðum lógunum samstundis. Tá er tað dagpeningalógin, sum skal takast framum.

Málbólkarnir, sum kunnu hugsast at lúka treytirnar í báðum lógunum eru:

- Foreldur at børnum við álvarsligari sjúku,
- Avvarðandi til persón við seinheilaskaða,
- Avvarðandi at persónum yngri enn 67 ár, sum eru doyggjandi

Veitingar eftir almannalógini verða einans veittar, tá inntøkumøguleikar eftir aðrari lóggávu eru troyttir – undir hesum eisini aðrar almannaveitingar. Tað merkir, at um ein persónur hevur

rætt til veiting eftir dagpeningalógini, so hevur viðkomandi ikki rætt til veiting eftir almannalógini.

Dagpeningaveitingin er svarandi til lønarmissin, tó í mesta lagi 80 % av løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Hægst møguliga veiting pr. dag er 868 kr. umframt frítíðarløn. Upphæddin pr. mánað er tengt at talinum av arbeiðsdøgum í mánaðinum. Í miðal er hægst møguliga veiting 18.147 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn.

Veitingin eftir § 25, stk. 1 í almannalógini er eins og í dagpengalógini svarandi til lønarmissin. Men hægst møguliga veiting eftir almannalógini er 25.000 kr. um mánaðin umframt frítíðarløn. Hægst møguliga veiting er sostatt munandi hægri í almannalógini enn í dagpengalógini.

*Veiting til avvarðandi eftir dagpeningalógini*
Dagpeningur vegna sjúku kann veitast persóni, hvørs barn ella hjúnafelagi gerast álvarsliga sjúk, og tað av lækna verður mett alneyðugt at persónurin er um tann sjúka. Sum álvarslig sjúka er at meta sjúka, har álvarsligur vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuni.

Dagpengalógin er sostatt avmarkað til ansing av hjúnafelaga og egnum barni. Hinvegin er dagpeningalógin ikki avmarkað til ávísar sjúkur, tó at treytin er, at sjúkan skal vera álvarslig.

*Veiting eftir almannalógini*
Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku kann eftir § 25, stk. 1 í almannalógin veitast eftir hesum treytum:

1. tá tað vegna likamligt ella sálarligt brek ella varandi sjúku er neyðugt at ansa barni í heiminum, ella at vera hjá barni í ávíst tíðarskeið í sambandi við viðgerð,
2. tá persónur undir fólkapensjónsaldri, sum ynskir at doyggja heima, verður ansaður av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til, ella
3. tá persónur undir fólkapensjónsaldri við seinheilaskaða, sum vegna vantandi pláss á bústaði sambært §§ 45 ella 46, verður ansaður í heiminum av persóni, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til.

Í almannalógini er endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku ikki avmarkað til hjúnafelaga, tí talan kann eisini vera um persón, sum ein hevur eitt serligt og tætt tilknýti til. Hetta kann vera t.d. vera familja o.o. Endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku eftir bæði dagpeningalógini og eftir almannalógini er ikki tengd at ognarviðurskiftum o.t.

Tá ein persónur fer av arbeiðsmarknaðinum fyri at vera um ein doyggjandi hjúnafelaga, tá verður endurgjald fyri mista inntøku veitt eftir dagpengalógini. Tað vil siga, at veitingin kann vera upp til 18.147 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn. Er tað t.d. eitt systkin, sum fer at ansa persóninum, tá er ikki heimild at veita eftir dagpengalógini, og endurgjald fyri mistu inntøkuna verður tá veitt sambært almannalógini. Tá kann veitingin vera upp til 25.000 kr. um mánaðin, umframt frítíðarløn. Sama støða kann vera galdandi, tá talan er um persón við seinheilaskaða. Sostatt kann tað vera ein týðandi fíggjarligur fyrimunur, at tað ikki er hjúnafelagin, sum fer heim at vera um sjúka persónin, men at tað er t.d. er annar persónur í familjuni.

Eisini í sambandi við sjúku hjá barni, kunnu foreldur lúka treytirnar bæði í almannalógini ella dagpengalógini. Og sambært galdandi lóggávu skal veitingin tá veitast sambært dagpeningalógini.

*1.2.2 Framskundað pensjón og dagpeningur vegna sjúku*

Persónur undir fólkapensjónsaldur, sum hevur varandi skert arbeiðsføri, hevur sambært almannapensjónslógini rætt til fyritíðarpensjón. Fyritíðarpensjón kann veitast á trimum ymiskum stigum, ávikavist hægsta-, miðal- og lægsta fyritíðarpensjón. Hægsta fyritíðarpensjón verður játtað teimum, sum ongan arbeiðsførleika hava, ella einans hava smávegis eftir av arbeiðsføri. Hægsta fyritíðarpensjón er endurbót fyri mistu arbeiðsinntøkuna, og hægsta fyritíðarpensjón er tí ikki sameiniligt við at hava arbeiðsinntøku. Tá persónur hevur fingið játtað hægstu fyritíðarpensjón, hevur hann ikki samstundis rætt til dagpening vegna sjúku.

Almannapensjónslógin er nú broytt (løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018, sum kom í gildi 1. januar 2020), og eitt nýtt pensjónsslag, framskundað pensjón, er sett í lógina. Persónur, sum lýkur treytirnar fyri tillutan av fyritíðarpensjón, og sum søkir, tá tað eru minni enn 3 ár, til hann verður fólkapensjonistur, fær framskundaða pensjón (viðkomandi fær sostatt ikki fyritíðarpensjón). Upphæddin, sum verður veitt til persón við framskundaðari pensjón er í minsta lagi svarandi til miðal fyritíðarpensjón. Um viðkomandi ongan arbeiðsførleika hevur, verður upphæddin, sum verður veitt, svarandi til hægstu fyritíðarpensjón.

Ein persónur, sum fær framskundaða pensjón við eini upphædd, sum svarar til hægstu fyritíðarpensjón, er sostatt í somu støðu sum ein persónur, sum fær hægstu fyritíðarpensjón. Sambært § 4 í dagpeningalógini hevur persónur, sum fær játtað hægstu fyritíðarpensjón, ikki rætt til dagpening vegna sjúku. Fær persónurin játtað framskundaða pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón, tá hevur hann sambært galdandi lóg rætt til dagpening vegna sjúku.

Í § 6 í almannapensjónslógini er ásett, at hægsta fyritíðarpensjón verður veitt teimum, sum eru varandi óarbeiðsførir í eini og hvørjari vinnu, ella sum einans hava smávegis eftir av arbeiðsføri. At ein persónur kann hava smávegis eftir av arbeiðsføri merkir eisini, at persónur við hægstu fyritíðarpensjón kann hava smávegis av inntøku, uttan at tað ávirkar rættin til pensjón.

Dagpeningaveitingin verður roknað við støði í miðal arbeiðsinntøku seinastu 5 vikurnar undan sjúkrafráveruni. Sambært galdandi lóggávu kann ein persónur við framskundaðari pensjón sostatt hava nakað av arbeiðsinntøku í eitt stutt tíðarskeið og síðani fáa dagpening í 40 vikur.

At tað skal vera munur á rætti til dagpening vegna sjúku hjá teimum, sum fáa hægstu fyritíðarpensjón og framskundaða pensjón við hægsta satsi, hevur ikki verið ætlanin. Í løgtingsmáli nr. 67/2017 har endamálið við framskundaðari pensjón er lýst, stendur, at "*Talan er ikki um ein nýggjan málbólk, men ætlanin er, at fólk, sum søkja um framskundaða pensjón, skulu fáa skjótari málsviðgerð og skulu hava styttri tíð frá umsókn til játtan.*". Tað hevur ikki verið ætlanin, at persónur við framskundaðari pensjón, skal hava onnur rættindi í dagpeningalógini enn persónur við fyritíðarpensjón. Hædd átti at verið tikið fyri hesum í sambandi við løgtingslóg nr. 66 frá 30. apríl 2018.

*1.2.3 Longt dagpeningatíðarskeið*

Dagpeningur vegna sjúku kann í mesta lagi verða veittur í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði. 40 vikur svara umleið til 9 mánaðir. Løn undir sjúku telur við í teimum 40 vikunum. Tað merkir, at tá ein persónur, sum hevur rætt til løn undir sjúku, fær løn frá arbeiðsgevara í t.d. 25 vikur, meðan hann er sjúkur, tá hevur hann rætt til dagpening vegna sjúku í upp til 15 vikur aftrat.

Einasta undantak í lógini, har dagpeningur kann veitast í longur enn 40 vikur, er í sambandi við arbeiðsskaða. Tá málið er fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum og verður viðgjørt eftir løgtingslóg um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða, kann dagpeningur verða veittur í upp til 2 ár. Verður málið staðfest sum arbeiðsskaði, tá endurrindar tryggingarfelag dapeningaútreiðslurnar til landið.

Dagpeningur verður veittur, tá ein persónur vegna sjúku, ikki fær arbeitt. Verður sjúkan staðfest at verða varandi, og arbeiðsføri harvið varandi skert, tá flytur persónurin yvir á aðra veiting – serliga til fyritíðarpensjón. Eisini kann talan blíva um arbeiðsbúgving ella tillagað starv sbrt. løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Arbeiðsbúgving og tillagað starv kann játtast, tá persónurin hevur fingið staðfest varandi skerdan arbeiðsførleika (at arbeiðførleikin er skerdur merkir, at nakað av arbeiðsføri er eftir).

Tað ber ikki altíð til eftir 40 vikum at siga, um sjúkan er varandi, ella um persónurin aftur fær fult arbeiðsføri. T.d. í sambandi við krabbamein kann ganga long tíð, áðrenn til ber at siga, hvønn veg tað ber. Eisini eru støður, har persónurin hevur fingið at vita, at hann sannlíkt verður frískur, men at tørvur er á endurvenjing ella eftirviðgerð, sum ger persónin óarbeiðsføran í fleiri mánaðir – eisini longur enn 40 vikur.

Persónar í hesum støðum kunnu hava tørv á, at byrja stigvíst aftur at arbeiða. Dagpengalógin hevur eina áseting um partvíst óarbeiðsføri. Trupulleikin er, at hesir persónar hava verið sjúkir í longur enn 40 vikur, og tá er ikki heimild at veita dagpening vegna sjúku. Ásetingin um partvíst óarbeiðsføri kann tá heldur ikki brúkast. Tá sjúkan ikki er varandi er heldur ikki heimild at játta tillagað starv ella fyritíðarpensjón.

Tá ein persónur hevur móttikið dagpening í 40 vikur, og viðkomandi framvegis ikki er arbeiðsførur, tá kann viðkomandi søkja um fyribils uppihaldsveiting eftir almannalógini. Treytin fyri at fáa rætt til fyribils uppihaldsveiting er, at tú ikki kanst uppihalda tær á annan hátt – t.d. við ogn. Ein persónur, sum hevur eina uppsparing ella hevur aðrar ognir, skal fyrst liva av tí, áðrenn hann kann fáa fyribils uppihaldsveiting. Í sambandi við fyribils uppihaldsveiting verður sæð burtur frá innistandandi upp til 30.000 kr.

Gongdin í sambandi við langtíðarsjúku er vanliga soleiðis, at flutt verður frá løn til dagpening vegna sjúku og síðani til fyribils uppihaldsveiting. Tað eru sum nevnt nøkur, sum ikki lúka treytirnar fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting.




Persónur, sum flytur millum inntøkukeldurnar omanfyri, hevur vanliga eina lækkandi inntøku. Hvussu inntøkan broytist er tó treytað av, um viðkomandi arbeiðir fulla tíð, av aldri, um viðkomandi hevur børn o.a.

Dagpeningur vegna sjúku er svarandi til mistu lønina, tó í mesta lagi 80 % av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Hægst møguliga upphædd er 868 kr. um dagin umframt frítíðarløn. Upphædd um mánaðin er treytað av talinum av arbeiðsdøgum í mánaðinum. Mánaðarligu upphæddirnar eru millum uml. 15.600 og 20.000

kr. Í miðal er hægst møguligu dagpengar 18.147 kr. um mánaðin umframt frítíðarløn. Upphæddin íroknað frítíðarløn er 20.325 kr.

Við fyribils uppihaldsveiting eru 6 ymiskir satsir, treytaðir av aldri, uppihaldsskyldu mótvegis børnum og bústaðarviðurskiftum.

**Fyribils uppihaldsveiting sambært almannalógini**

| | |
|---|---|
| Uppihaldsskyldu mótvegis børnum – býr einsamallur | 16.697 kr. |
| Uppihaldsskyldu mótvegis børnum – býr saman við øðrum vaksnum persóni | 12.986 kr. |
| 25 ár og eldri, uttan børn – býr einsamallur | 13.914 kr. |
| 25 ár og eldri, uttan børn – býr saman við øðrum vaksnum persóni | 9.276 kr. |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn – býr ikki hjá foreldrum | 7.421 kr. |
| Yngri enn 25 ár, uttan børn – býr hjá foreldrum | 4.081 kr. |

Upphæddirnar omanfyri eru skattskyldugar.

*Dømi*
Hjá einum giftum persóni í 50 árunum, sum ikki hevur børn yngri enn 18 ár, sum arbeiðir fulla tíð við løn á 30.000 kr. um mánaðin, verður inntøkan hendan í sambandi við langtíðarsjúku (áðrenn skatt):




Í 2018 vóru 68 persónar, sum duttu úr dagpeningaskipanini, tí tey høvdu fingu dagpening í 40 vikur. Inntøkugrundarlagið hjá hesum 68 persónunum, aftaná at tey vóru farin úr dagpeningaskipanini var hetta:

- 28 persónar fingu játtað fyritíðarpensjón,
- 10 persónar fóru í arbeiðsbúgving sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,
- 9 persónar fingu fyribils hjálp sambært forsorgarlógini (forsorgarlógin er nú sett úr gildi, og almannalógin er komin í staðin),
- 5 persónar høvdu onga ella heilt lága inntøku,
- 1 persónur fekk aðra veiting,
- 15 persónar fóru aftur til arbeiðis.

Tað er ikki óhugsandi, at onkur av teimum 15 persónunum, sum fóru aftur til arbeiðis, ikki hava endurvunnið fullan arbeiðsførleika, og at hesi eru farin aftur til arbeiðis, tí fíggjarligu umstøðurnar hava verið trongar.

*1.2.4 Útsett pensjón og dagpeningur*

Persónur føddur aftaná 1952 hevur møguleika at útseta fólkapensjónina. Endamálið við útsettari pensjón er at eggja fólki at arbeiða eftir vanligan pensjónsaldur, soleiðis at borgarin

fær eitt longri arbeiðslív og afturfyri at fáa hægri pensjón seinni. Hetta er til fyrimuns fyri bæði tann einstaka og fyri samfelagið.

Tað er bara fólkapensjónin, sum kann útsetast. Útgjaldið frá Samhaldsfasta kann ikki útsetast, og persónur við útsettari pensjón fær sostatt altíð útgjaldið frá Samhaldsfasta, uttan mun til inntøku. Útgjald frá Samhaldsfasta í 2021 er 5.865 kr. um mánaðin. Harumframt sleppa øll í fólkapensjónsaldri undan at rinda arbeiðsmarknaðargjøld, og vanliga verður sáttmálaásett eftirlønargjald útgoldið saman við lønini. Nøkur hava eisini privata pensjónsuppsparing, sum verður útgoldin, tá fólkapensjónsaldurin verður rokkin. Sum árini ganga verða fleiri, sum fara at fáa privata pensjón útgoldna. Um nøkur ár verða tað so at siga allir borgarar, sum at hava útsetta pensjón, sum eisini fara at fáa privata pensjón útgoldna.  Persónar við útsettari pensjón hava sostatt betri treytir enn tey, sum ikki eru pensjonistar.

Hjá pensjonistum føddir aftaná 1952 verður mótroknað í allari pensjónini – t.v.s. eisini í grundupphæddini. Persónur, sum hevur somikið høga lønarinntøku, at millum lítið og onki er eftir av fólkapensjónini, hevur sostatt onki at missa við at útseta pensjónina. Skipanin við útsettari pensjón er sum nevnt einans galdandi fyri persónar føddir aftaná 1952 (og sum blíva fólkapensjonistar í 2020 ella seinni). Higartil eru umleið 20 % av øllum pensjonistum føddir aftaná 1952, sum hava útsett pensjónina.

Ein persónur, sum útsetir fólkapensjónina, skal søkja um pensjón fyri síðani at søkja um at fáa pensjónina útsetta. Sostatt er tað ein treyt fyri at fáa pensjónina útsetta, at hon fyrst er tillutað. Tað er ásett í dagpengalógini, at persónur, sum hevur fingið tillutað fólkapensjón, ikki hevur rætt til dagpening.

Persónar við útsettari pensjón kunnu hava rætt til løn undir sjúku (sambært starvsmannalógini ella sambært sáttmála). Um viðkomandi ikki hevur rætt til løn undir sjúku, so er hann fyri lønarmissi men hevur ikki rætt til dagpening. Inntøkugrundarlagið er tá avmarkað til útgjald frá Samhaldsfasta og møguliga privata pensjón.

Útsetan av pensjón kann til einhvørja tíð steðgast við virknaði frá 1. í mánaðinum eftir, at umsókn er send Almannaverkinum. Tað merkir, at ein persónur við útsettari pensjón, sum verður sjúkur í longur tíð, altíð kann velja at steðga útsetanini, og viðkomandi fær sostatt fólkapensjón í staðin. Sambært almannapensjónslógini kann pensjónin útsetast tvær ferðir, og ein persónur, sum t.d. verður sjúkur í longur tíð, og sum aftur fer á arbeiðsmarknaðin, hevur møguleika aftur at útseta pensjónina.

Í § 4 í dagpeningalógini er ásett, at rætturin til dagpening dettur burtur, tá persónur hevur fingið tillutað fólkapensjón <u>ella er fyltur 70 ár</u>. Hetta merkir, at persónur, sum hevur frásagt sær fólkapensjón, hevur havt rætt til dagpening vegna sjúku, men bert inntil viðkomandi er fyltur 70 ár. Aldursmarkið hevur tó ikki havt praktiskan týdning, tí grundupphæddin hevur inntil 1. januar 2020 verið útgoldin uttan mun til inntøku, og so at siga allir fólkapensjonistar hava sostatt móttikið grundupphæddina.

*1.2.5 Stjórar í smærri feløgum*
Við verandi dagpeningalóg eru tvær ymiskar skipanir.

1. Tað eru tey, sum eru beinleiðis fevnd av lógini. Í hesi skipanini verður dagpeningur veittur í mun til inntøku frammanundan sjúkrafráveruna, tó í mesta lagi 80 % av løn sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

2. Harumframt er ein sjálvboðin tryggingarskipan fyri sjálvstøðug vinnurekandi og stjóra í egnum felag. Tryggingartakarin rindar eitt tryggingargjald, sum er 3.200 kr. fyri hálvárið. Tey, sum fáa útgjald frá sjálvbodnu tryggingini, fáa dagpening frá fyrsta fráverudegi og fáa altíð hægstu dagpeningaupphædd (80 % av omanfyrinevndu sáttmálaløn).

Beinleiðis fevnd av dagpengalógini eru:

- vanligir løntakarar, sjómenn og útróðrarmenn
- sjálvstøðugir vinnurekandi, sum ikki ella í lítlan mun hava leysa arbeiðsmegi aftrat sær.

Kunnu tekna trygging:

- øll sjálvstøðug vinnurekandi (t.v.s. eisini tey, sum hava arbeiðsmegi afturat sær)
- stjóri í egnum felag, sum ikki hevur, ella í lítlan mun hevur leysa arbeiðsmegi afturat sær.

Fleiri persónar, sum eru sjálvstøðugir vinnurekandi, stovna sær t.d. smápartafelag. Virksemið er tá í felagnum, og persónurin, sum eigur felagið, er tá vanliga stjóri í felagnum. Ein sjálvstøðugur vinnurekandi, sum hevur arbeiðsmegi afturat sær, kann tekna trygging hjá sjálvbodnu tryggingarskipanini hjá Almannaverkinum. Men um hann hevur flutt virksemið í eitt felag, kann hann ikki tekna trygging.

Ein arbeiðsgevari er ikki at rokna sum ein løntakari, tí hann m.a. stílar fyri arbeiðinum, sum løntakarar gera. Arbeiðsgevarin er vanliga stjórin í einum felag, har hann eisini sjálvur kann gera av, um hann hevur rætt til løn undir sjúku. Tí hevur stjórin ikki verið fevndur av dagpengalógini. Ásannandi at stjórar í smærri feløgum kunnu detta niðurímillum almennu skipanirnar í sambandi við sjúku, varð dagpeningalógin broytt í 2017 soleiðis, at stjóri í egnum felag kann tekna trygging (løgtingslóg nr. 86 frá 29. mai 2017).

Við broytingini í 2017 fingu stjórar í egnum felag møguleika at tekna seg til sjálvbodnu tryggingina hjá Almannaverkinum. Broytingin var tó avmarkað til feløg, sum ikki høvdu onnur í starvi enn stjóran sjálvan, ella at stjórin í mesta lagi hevur nakað av leysari arbeiðsmegi afturat sær.

Ein stjóri í eini lítlari fyritøku, sum ikki kann vera fevndur av sjálvbodnu tryggingini hjá Almannaverkinum (tað vil siga í feløgum, sum hava arbeiðsmegi afturat stjóranum), kann koma í støðuna, at inntøkan dettur burtur, um hann verður raktur av sjúku. Ein álvarslig sjúka kann sostatt eisini blíva til ein álvarsligan fíggjarligan trupulleika hjá viðkomandi og hjá fyritøkuni.

Tað kann vera eitt dømi um 3 persónar, sum saman eiga og reka ein útróðrarbát. Virksemið er skipað í einum felag – t.d. einum smápartafelag. Ein av persónunum skal standa sum stjóri í felagnum. Í hesum dømi eru teir báðir persónarnir, sum ikki eru stjórar, beinleiðis fevndir av dagpeningaskipanini, meðan stjórin ikki er fevndur av lógini og ikki hevur rætt til dagpening vegna sjúku. Stjórin kann heldur ikki tekna seg til sjálvbodnu tryggingina, tí hann hevur arbeiðsmegi afturat sær. Harumframt er ein treyt fyri at kunna tekna trygging, at stjórin sjálvur eigur 100 prosent av ognarlutunum í felagnum.

Sambært almennu viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 84/2017 (omanfyrinevnda lógarbroyting) varð talan um eina varisliga broyting. Løgtingsins Trivnaðarnevnd kannaði møguleikarnar at víðka skipanina soleiðis, at hon ikki var avmarkað til stjóra, sum ikki hevði

arbeiðsmegi afturat sær, men niðurstøðan var tá, at tað hevði verið ein meginreglulig broyting, sum lógaruppskotið ikki upprunaliga ikki hevði lagt upp fyri.

*1.2.6 Kærumyndugleikin broytir sítt virksemi*
Kærumyndugleikin hevur skift navn frá Kærunevndin í almanna- og heilsumálum, til Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum. Harumframt er ætlanin at broyta virksemi í Føroya Kærustovni, og at tað frameftir verður Føroya Kærustovnur, sum verður kærumyndugleiki (og ikki ymsu nevndirnar skipaðar undir Føroya Kærustovni).

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið við uppskotinum er at betra um vælferðina. Eisini er endamálið at betra um samanhangin millum ymsa lóggávu umframt at fremja tekniskar broytingar.

*1.3.1 Persónur, ið lýkur treytir í dagpengalógini og almannalógini*
Endamálið við hesi broytingini er, at tað ikki skal vera munur millum, hvør avvarðandi fer heim at ansa persóni, sum er doyggjandi ella ella persóni við seinheilaskaða. Eisini foreldur, sum ansa sínum børnum, og sum lúka treytirnar í § 25, stk. 1 í almannalógini, skulu verða tryggjað veiting í almannalógini. Tað verður ásett í dagpeningalógini, at í teimum førum, persónur lýkur krøvini í § 25, stk. 1 í almannalógini, tá kann viðkomandi ikki fáa veiting eftir dagpengalógini. Broytingin verður til fyrimuns fyri borgaran, tí veitingin í nøkrum førum verður hægri.

Í galdandi lóggávu er tað soleiðis, at ein persónur, sum lýkur treytir í bæði dagpeningalógini og í almannalógini í sambandi við ansing av avvarðandi, tá skal viðkomandi hava veiting sambært dagpengalógini. Í báðum lógunum er veitingin 100 prosent av mistu arbeiðsinntøkuni, men hámarkið í dagpeningalógini er munandi lægri enn í almannalógini, og tí er tað ein fyrimunur fyri øll tey, sum hava inntøku hægri enn umleið 20.000 kr. um mánaðin, at veitingin verður veitt eftir almannalógini.

Frameftir verður tað soleiðis, at veiting í sambandi við ansing av doyggjandi og ansing av persóni við seinheilaskaða verður veitt sambært almannalógini. Nøkur foreldur, ið ansa børnum yngri enn 18 ár, fara eisini at fáa veiting eftir almannalógini heldur enn eftir dagpengalógini. Broytingin fer ikki at ávirka persónar við lágum inntøkum (niðursetta tíð), tí veitingin verður framhaldandi svarandi til mistu arbeiðsinntøkuna. Fyri persónar, sum hava inntøku hægri enn uml. 20.000 kr. um mánaðin, verður við hesi lógini talan um ein fyrimun, tí veitingin verður hægri.

Sambært § 3, stk. 3 og 4 í dagpeningalógini kann dagpeningur veitast persóni, hvørs hjúnafelagi gerst álvarsliga sjúkur. Sum álvarslig sjúka er at meta sjúka, har álvarsligur vandi er fyri lívinum ella heilsustøðuni hjá persóninum. Persónur, sum ansar einum doyggjandi, lýkur treytirnar í § 3, stk. 3 og 4, og persónur, ið ansar einum seinheilaskaddum, vil í ávísum førum lúka hesar treytir. Viðvíkjandi børnum er tað soleiðis, at er talan um varandi sjúkt barn, tá verður endurgjald fyri mista inntøku veitt eftir almannalógini, meðan tað verður veitt eftir dagpeningalógini, tá talan er um álvarsliga sjúku. Í nøkrum málum eru treytirnar loknar í báðum lógum.

Høvuðsreglan í almannalógini er, at veiting sambært aðrari lóggávu altíð kemur framum. Tað merkir, at møguleikar sambært aðrari lóggávu skulu troytast, áðrenn veiting eftir almannalógini verður veitt. Í nøkrum førum er tað ein fyrimunur fyri borgaran at fáa veiting eftir

almannalógini, og tí verður við hesum lógaruppskoti ásett í dagpeningalógini, at persónur, sum lýkur treytirnar í almannalógini, ikki hevur rætt til veiting eftir dagpeningalógini. At tað verður gjørt á henda hátt, er fyri at varðveita høvuðsregluna í almannalógini um, at almannalógin er tað niðasta trygdarnetið.

*1.3.2 Framskundað pensjón og dagpeningur vegna sjúku*

Endamálið við hesi broytingini er at rætta upp uppá ósamsvar, sum er millum almannapensjónslógina og dagpeningalógina. Tað hevur ikki verið ætlanin, at persónur, sum fær framskundaða pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón, skal hava rætt til dagpening vegna sjúku.

Støðan eigur ikki at koma fyri, at ein borgari fær báðar hesar veitingar, tí framskundað pensjón við hægstu veiting verður einans játtað persónum, sum ikki hava arbeiðsførleika ella bert hava smávegis eftir av arbeiðsføri. Skipanin við framskundaðari pensjón hevur einans verið í gildi síðani 1. januar 2020, og sostatt eru higartil ongir borgarar við framskundaðari pensjón, sum enn hava móttikið dagpening vegna sjúku.

Við hesum uppskoti verður rætturin til dagpening vegna sjúku tikin burtur hjá persónum, sum fáa framskundaða pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón. Persónar, sum fáa framskundaða pensjón við einum satsi, sum svarar til miðal- ella lægstu fyritíðarpensjón, fara framhaldandi at hava rætt til dagpening vegna sjúku.

*1.3.3 Longt dagpeningatíðarskeið*

Endamálið við broytingini er at gera eina skipan, sum er betri fyri borgaran. Generella tíðarskeiðið, har dagpeningur vegna sjúku kann verða veittur, verður longt úr 40 upp til 52 vikur. Í teimum førum talan er um álvarsliga sjúku, har tað ikki kann staðfestast, at sjúkan er varandi, og hjá persónum, sum eru í viðgerð, har tað er sannlíkt, at persónurin aftur vinnur arbeiðsføri, kann dagpeningatíðarskeiðið verða longur enn 52 vikur.

Sambært galdandi lóggávu kann dagpeningur vegna sjúku veitast í mesta lagi í 40 vikur í einum 12 mánaða skeiði (svarandi til umleið 9 mánaðir). Tíðarskeið, har sjúklingur fær løn undir sjúku, er íroknað teimum 40 vikunum. Einasta undantak, har dagpeningur vegna sjúku kann veitast í longur tíð, er í sambandi við mál, sum er fráboðað Vanlukkutryggingarráðnum, og sum verður viðgjørt eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini. Í øllum øðrum málum steðgar dagpeningaveitingin eftir 40 vikum, uttan mun til sosialu umstøðurnar.

Við hesum uppskotinum verður tíðarskeiðið longt úr 40 vikum í einum 12 mánaða skeiði upp til 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði. Í hinum norðurlondunum eru hesi rættindi í sambandi við dagpening vegna sjúku:

| Danmark | Finnland | Ísland | Norra | Svøríki |
|---|---|---|---|---|
| 22 vikur í 9 mán. | 52 vikur í 2 ár | 52 vikur í 2 ár | 52 vikur í 3 ár | Onki mark |

*Viðm.: Í Danmark eru fleiri møguleikar fyri longdum tíðarskeiði*

Umframt at leingja generella tíðarskeiðið hevur lógaruppskotið við sær, at dagpeningur eisini kann veitast í longur tíð enn 52 vikur. Longda tíðarskeiðið kann verða veitt í sambandi við álvarsliga ella lívshættisliga sjúku ella skaða, har tað ikki kann staðfestast, at óarbeiðsførið er varandi. Eisini persónur, sum hevur havt álvarsliga sjúku ella hava verið fyri skaðatilburði, sum er í viðgerð, og har tað er sannlíkt, at viðkomandi aftur vinnur arbeiðsføri, kann fáa dagpening í longur enn 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði.

Persónar við langtíðarsjúku, har sjúkan ikki er varandi, hava avmarkaðar møguleikar til stigvíst at byrja aftur á arbeiðsmarknaðinum. Tá sjúkan ikki er varandi, er ikki heimild at játta tillagað starv sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, og tað er onki, sum eitur fyribils fyritíðarpensjón. Einasti møguleiki fyri veiting er tá fyribils uppihaldsveiting eftir almannalógini, men tað eru ikki øll, ið lúka treytirnar fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting.

Dagpeningalógin hevur ásetingar um partvíst óarbeiðsføri, men bert innanfyri tær 40 vikurnar (sum frameftir verða 52 vikur). Fyri ein persón, sum eftir langa sjúkralegu er um at koma fyri seg, kann tað vera ein fyrimunur at byrja stigvíst aftur at arbeiða. Hetta lógaruppskotið hevur við sær, at ásetingin um partvíst arbeiðsføri í størri mun kann verða brúkt.

Við broytingini verður borgari, sum hevur álvarsliga sjúku, ella sum er í eini tilgongd, har hann er við at endurvinna arbeiðsføri, tryggjaður inntøku frá dagpeningaskipanini.

*1.3.4 Útsett pensjón og dagpeningur*

Endamálið við broytingini er at skapa betri karmar fyri tey, sum útseta pensjónina, og at tey kunnu varðveita sína inntøku, hóast tey gerast sjúk. Persónur við útsettari pensjón fer sostatt at hava rætt dagpening, um hann er fyri inntøkumissi í sambandi við sjúku.

Verandi áseting í dagpeningalógini ásetir, at persónur, sum hevur fingið játtað fólkapensjón, ikki hevur rætt til dagpening vegna sjúku. Fyri at ein persónur skal kunna útseta pensjónina, skal hann fyrst fáa pensjónina játtaða, og tí hevur hann ikki rætt til dagpening. Við hesum lógaruppskotinum verða tað einans fólkapensjonistar, sum faktiskt móttaka fólkapensjón, sum ikki hava rætt til dagpening.

Tað verður við hesum uppskoti ásett, at persónur, sum móttekur fólkapensjón, hevur ikki rætt til dagpening vegna sjúku. Tað kunnu vera persónar, sum ikki hava útsett pensjónina, hóast inntøkan er somikið høg, at fólkapensjónin er fult mótroknað. Broytingin fer eisini at geva hesum persónum rætt til dagpening vegna sjúku, um teir annars lúka treytirnar í dagpeningalógini. At persónur ikki móttekur fólkapensjón, og pensjónin ikki er útsett, verður tó væntandi ikki ein vanlig støða og fær lítlan og ongan praktiskan týdning, tí talan verður um sera fáar persónar. Broytingin fer sostatt í praksis at fevna um tey, sum útseta pensjónina.

Ein stórur partur av teimum, sum útseta fólkapensjónina, hava frammanundan rætt til løn undir sjúku – antin sambært sáttmála ella sambært lóg. Men rætturin til løn undir sjúku røkkur einans meðan tey eru í starvi. Um talan um langtíðarsjúku, og tey tí verða søgd úr starvi, tá dettur rætturin til løn undir sjúku burtur, og rættindini verða tá tey somu sum hjá teimum, sum ikki hava rætt til løn undir sjúku. Frameftir verða hesi fevnd av dagpeningalógini.

Um tað verður mett ósannlíkt, at persónur við útsettari pensjón kann venda aftur til arbeiðsmarknaðin, tá hann hevur verið óarbeiðsførur í mesta lagi í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði, tá steðgar dagpeningaveitingin beinanvegin. Borgarin kann altíð steðga útsetanini av pensjónini og sostatt fáa sína fólkapensjón í staðin fyri dagpening. Hetta er fyri at fyribyrgja at dagpeningaskipanin verður brúkt sum eitt slag av fyribils pensjónsskipan.

Fyri hvønn mánað ein persónur útsetir pensjónina, hækkar fólkapensjónin við einum ávísum prosentið og eftir einum ávísum leisti. Tað merkir, at tess longri pensjónin er útsett, tess hægri verður pensjónin seinni. Persónur við útsettari pensjón vinnur eisini hendan rættin, ímeðan hann móttekur dagpening vegna sjúku. Rætturin til at útseta pensjónina er treytaður av, at

viðkomandi arbeiðir í minsta lagi 1000 tímar í einum álmanakkaári. Dagpeningur vegna sjúku kemur í staðin fyri løn, og tí er dagpeningatíðarskeið at rokna sum arbeiði.

*1.3.5 Stjórar í smærri feløgum*

Endamálið við broytingini er, at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum stovna sítt egna felag og at betra um karmarnar, hjá smærri fyritøkum og íverksetarum.

Ein stjóri í einum felag kann koma út fyri, at hann er uttan inntøku, um hann verður sjúkur. Av tí at hann er stjóri, er hann ikki beinleiðis fevndur av dagpengalógini, og um hann hevur starvsfólk afturat sær, ella um hann ikki er einsamallur um at eiga felagið, kann hann ikki tekna seg til sjálvbodnu tryggingarskipanina hjá Almannaverkinum.

Við hesum lógaruppskotinum verður persónsskarin, sum kann tekna seg til sjálvbodnu tryggingarskipanina, víðkaður til eisini at fevna um stjórar í smærri feløgum, har stjórin hevur starvsfólk afturat sær. Mett verður, at stjórar í lítlum fyritøkum eru meira útsettir í sambandi við sjúku ella skaða, enn stjórar í størri fyritøkum, m.a. tí stjórin beinleiðis er við til at skapa inntøkur til felagið, og at størri feløg hava betri møguleika at skipa síni viðurskifti. Tí er sett eitt hámark fyri støddina á fyritøkuni, har stjórin kann tekna trygging.

Í verandi skipan er tað stjórin í egnum felag, sum kann tekna trygging, og stjórin skal sostatt eiga fyritøkuna einsamallur. Við hesum uppskotinum verður persónsskarin víðkaður til eisini at fevna um stjórar, sum hava starvsfólk afturat sær, og samstundis verður farið burtur frá treytini um, at stjórin einsamallur skal eiga fyritøkuna. Tað merkir, at stjórin, sum t.d. hevur stovnað fyritøkuna saman við øðrum ella saman við starvsfólki, eisini fær møguleika at tekna trygging.

Tað verður ein treyt fyri, at kunna tekna trygging, at felagið seinast álíknaða inntøkuár í mesta lagi hevði lønarútreiðslur svarandi til 390 ferðir hægstu dagpeningaveiting um vikuna. Hetta svarar til, at árliga lønarútreiðsla hjá fyritøkuni í mesta lagi kunnu vera knappliga 1,9 mió. kr.

Avmarkingin á lønarútreiðslunum er sum nevnt beinleiðis knýtt at hægstu dagpeningaupphædd. Hægsta dagpeningaupphædd fylgir lønargongdini á arbeiðsmarknaðinum, og sostatt slepst undan árligari javning. Tað verður ikki mett nøktandi at áseta eina avmarking t.d. sum tal av ársverkum. Tal av ársverkum kann vera trupult hjá Almannaverkinum at meta um, tí talan kann vera um broytingar í árinum, árstíðarbundið arbeiði o.s.fr.

Ein stjóri, sum hevur rætt til løn undir sjúku, fær ikki rætt til dagpening, um hann á annan hátt hevur rætt til løn undir sjúku.

*1.3.6 Kærumyndugleikin broytir sítt virksemi*

Ætlandi verður løgtingslógin um Føroya Kærustovn broytt soleiðis, at virksemið verður umskipað og flutt frá kærunevndum til Føroya kærustovn. Tí skal Føroya Kærustovnur standa sum kærumyndugleiki.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær 6 ymiskar broytingar, sum hava ymisk endamál og ikki eru beinleiðis tengdar at hvørjum øðrum.

*1.4.1 Persónur, ið lýkur treytir í dagpengalógini og almannalógini*
Persónur, sum lýkur treytirnar samstundis í dagpengalógini og almannalógini, fer frameftir at fáa veiting eftir almannalógini. Veitingin í almannalógini kann vera hægri enn í dagpengalógini, og tí verður tað ein fyrimunur fyri nakrar borgarar.

*1.4.2 Framskundað pensjón og dagpeningur vegna sjúku*
Persónur, ið hevur fingið játtað framskundaða pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón, verður javnsettur við persón við hægstu fyritíðarpensjón.

*1.4.3 Longt dagpeningatíðarskeið*
Dagpeningur verður frameftir veittur í mesta lagi í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði. Dagpeningur kann í ávísum førum verða veittur í longur tíð enn 52 vikur.

*1.4.4 Útsett pensjón og dagpeningur*
Dagpengalógin er broytt soleiðis, at rætturin til fólkapensjón dettur burtur, tá persónur móttekur fólkapensjón. Sambært higartil galdandi áseting dettur rætturin til dagpening burtur, tá persónur hevur fingið tillutað fólkapensjón. Broytingin fer í praksis at merkja, at persónur við útsettari pensjón fer at fáa rætt til dagpening vegna sjúku.

*1.4.5 Stjórar í smærri feløgum*
Í verandi skipan kann ein stjóri í egnum felag tekna seg til sjálvbodnu tryggingina hjá Almannaverkinum. Skipanin verður við hesum lógaruppskoti víðka til eisini at fevna um stjóra í felagi, sum hevur starvsfólk afturat sær, og avmarkingin um, at stjórin einsamallur skal eiga felagið, verður tikin burtur.

*1.4.6 Kærumyndugleikin broytir sítt virksemi*
Konsekvensbroyting av at kærumundugleikin verður umskipaður.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ligið til almenna hoyring á hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Harumframt er uppskotið sent hesum til hoyringar:

Almannaverkinum
Fíggjarmálaráðnum
Føroya Handverkarafelag
Føroya Kommunufelag
Føroya Kærustovni
Heilsumálaráðnum
Krabbameinsfelagnum
Landsfelag Pensjónista
MEGD
Ráðgevingini fyri føroyingar í Danmark
Samtaki
Sjúklingaráðnum
Sosialráðgevarafelag Føroya
Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
Vinnuhúsinum

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað vísir seg serliga trupult at meta um útreiðslur til dagpening vegna sjúku, tí sjúkutíttleikin vísir seg at vera rættiliga ymiskur frá ár til ár. Sostatt skulu metingar um fíggjarligar avleiðingar av broyttari lóggávu eisini takast við fyrivarni.

Leysliga mett fer hetta lógaruppskotið at hava við sær, at útreiðslurnar á komandi fíggjarlóg fara at hækka við 1,5 til 2 mió. kr. Árini frameftir kunnu útreiðslurnar hækka eitt sindur aftrat.

Niðanfyri verða fíggjarligu avleiðingarnar av ymsu broytingunum lýstar.

*2.1.1 Persónur, ið lýkur treytir í dagpengalógini og almannalógini*

Talan er um heilt fá mál, har persónur lýkur treytirnar í bæði dagpengalógini og almannalógini samstundis, og sostatt eru fíggjarligu avleiðingarnar mettar at vera avmarkaðar. Almannalógin hevur bara verið í gildi í nakrar mánaðir og higartil er okkurt einstakt mál, sum hevur tikið seg upp.

Ein treyt fyri at fáa veiting eftir dagpengalógini er, at støðan skal vera hættislig. Í nøkrum førum kann hendan støðan vera í eitt rættiliga langt tíðarskeið, t.d. tá talan er um børn við krabbameini, meðan í øðrum førum er talan avmarkað tíðarskeið.

Munurin á hægstu veiting í ávikavist dagpengalógini og í almannalógini er uml. 80.000 kr. pr. persón um árið. Broytingin fer væntandi at hava við sær, at útreiðslur landskassans fara at økjast við nøkrum fáum hundrað túsund krónum.

*2.1.2 Framskundað pensjón og dagpeningur vegna sjúku*

Broytingin hevur ógvuliga avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar. Skipanin við framskundaðari pensjón kom í gildi 1. januar 2020, og enn hevur ongin persónur við framskundaðari pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón, fingið dagpening vegna sjúku. Verður lógin ikki broytt kunnu einstakir persónar, sum áður ikki hava havt rætt til dagpening (áðrenn 1. januar 2020), fara at fáa dagpening.

*2.1.3 Longt dagpeningatíðarskeið*

Metingin er gjørd við støði í øllum dagpengamálum í 2018. Tá vóru 68 persónar, sum fingu dagpening í samfullar 40 vikur, og sum tí duttu úr dagpeningaskipanini. Inntøkan hjá teimum 68 fólkunum aftaná, at tey vóru farin úr dagpeningaskipanini, var hendan:

- Arbeiðsbúgving ella fyritíðarpensjón, 38 fólk
- Forsorgarhjálp (sum í dag eitur fyribils uppihaldsveiting) ella aðra veiting, 10 fólk
- Aftur til arbeiðis, 15 fólk
- lítla og onga a-inntøku, 5 fólk

Tað kann hugsast, at nøkur av teimum, sum fóru aftur til arbeiðis, høvdu móttikið dagpening í longur tíð, um tað var møguligt, og tey av fíggjarligum orsøkum eru byrjað aftur áðrenn tey hava fingið fullan arbeiðsførleika. Nøkur høvdu kanska byrjað lutvíst og fingið lutvísa dagpening. Hetta tí tey fíggjarliga hava verið noydd til tess.

Við støði í hagtølum frá 2018 høvdu tað í mesta lagi verið 20 fólk, sum høvdu hildið fram í dagpeningaskipanini, um tey fingu møguleika til tað. Meirútreiðslan fyri landskassan hevði leysliga mett verið 0,5 til 1 mió. kr.

Eitt fyrivarni, sum tað ikki er tikið hædd fyri í metingini, er, at tað kunnu vera arbeiðsgevarar, sum rinda løn til langtíðarsjúk starvsfólk í longur tíð enn 40 vikur. Hesir løntakarar koma ongantíð inn í dagpeningaskipanina og síggjast ikki í hagtølunum. Tað ber ikki til at meta um, í hvussu stóran mun hetta fer fram. Tað kunnu sostatt vera langtíðarsjúkir borgarar, sum Almannaverkið ikki veit um, og sum frameftir kunnu fara at søkja um dagpening vegna sjúku.

*2.1.4 Útsett pensjón og dagpeningur*

Tað kann væntast, at persónar, sum útseta pensjónina, hava somikið høgt inntøkugrundarlag, at hesi í flestu førum fara at fáa hægstu dagpeningaupphædd. Hægsta dagpeningaupphædd er 972 kr. Upphæddin um mánaðin er treytað av talinum av arbeiðsdøgum. Í miðal er upphæddin 20.325 kr. um mánaðin (íroknað frítíðarløn).

Soleiðis sum skipanin er í dag, er tað sannlíkt, at ein persónur við útsettari pensjón, sum verður longurvarandi sjúkur, velur at steðga útsetanini. Viðkomandi fær tá fólkapensjón í staðin, sum í mesta lagi er 8.948 kr. um mánaðin.

Enn er ov stutt fráliðið til, at tað ber til at siga, hvussu leingi fólkapensjonistar vanliga útseta pensjónina, og tí ber ikki til at siga, hvussu stórur persónsskarin verður, sum fer at fáa nýggja rættin til dagpening. Í dag eru umleið 120 persónar við útsettari pensjón. Ógvuliga leysliga mett fara tað um eini 3-4 ár støðugt at vera umleið 300 fólkapensjonistar í skipanini, sum hava útsetta pensjón.

Tað er bert ein partur av hesum 300 persónunum, sum fara at vera fevnd av dagpengalógini, tí starvsmenn og onnur, sum hava rætt til løn undir sjúku, hava ikki rætt til dagpening.

Broytingin hevur við sær, at útreiðslurnar til dagpening vegna sjúku fara at økjast ógvuliga leysliga mett við 500-700 tús. kr. á komandi fíggjarlóg. Um 3-4 ár er útreiðsluvøksturin leysliga mett hækkaður til umleið 1 til 1,5 mió. kr. Metingin er gjørd við støði í, at uml. 1/3 av teimum við útsettari pensjón ikki hava rætt til løn undir sjúku, og at tey í miðal hava sjúkrafráveru í 14 dagar um árið.

*2.1.5 Stjórar í smærri feløgum*

Skipanin við sjálvbodnari trygging er lutvíst fíggjað av tryggingartakarum. Tryggingargjaldið er 3.200 kr. fyri hvørt hálva árið. Inntøkurnar svara umleið til 35-40 prosent av samlaðu útreiðslunum av skipanini.

**Sjálvboðin trygging - útreiðslur og inntøkur**

| | *2014* | *2015* | *2016* | *2017* | *2018* | *2019* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur brutto | 1592 | 1177 | 1325 | 1244 | 1435 | 1529 |
| Inntøkur | 650 | 510 | 568 | 456 | 522 | 569 |
| **Nettoúrslit** | 942 | 667 | 757 | 788 | 913 | 960 |

Tað skal nevnast, at útreiðslurnar til sjálvbodna trygging í 2020 øktust til 2.462 tús. kr. brutto og 1.694 netto, men ein týðandi orsøk til útreiðsluvøksturin skyldast COVID-19.

Tað ber ikki til at meta um, hvussu nógvir stjórar fara at brúka nýggja møguleikan at tekna trygging. Síðani lógin bleiv broytt við virknaði frá 1. juli 2017 og stjórar í egnum felag fingu møguleikan at tekna trygging, eru útreiðslurnar til sjálvbodnu tryggingarskipanina øktar við 150 til 200 tús. kr. (útreiðslurnar í 2020 og væntað 2021 eru óvanligar, og tí eru hesi bæði árini ikki tikin við).

Hetta lógaruppskotið væntast at hava við sær avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Mett verður, at talið av teimum, sum fara at tekna trygging fer at økjast við áleið somu mongd sum í 2017, og at útreiðslur landskassans sostatt hækka við leysliga mett 2-300 tús. kr.

*2.1.6 Kærumyndugleikin hevur broytt navn*
Broytingin hevur ongar fíggjarligar avleiðingar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri landið. Persónsskarin verður víðkaður, og tað kunnu tí blíva eitt sindur fleiri mál at viðgera.

Broytingin um persónar, sum lúka treytirnar í bæði almannalógini og dagpengalógini, lættir eitt sindur um í einstøkum málum. At tað verður gjørligt at fáa dagpening í eitt longur tíðarskeið kann hava við sær, at Almannaverkið skal viðgera eitt vet færri umsóknir um fyribils uppihaldsveiting eftir almannalógini.

Hinvegin fer tað at krevja meira málsviðgerð í sambandi við at Almannaverkið skal meta um, um persónur við útsettari pensjón kann koma aftur til arbeiðis, áðrenn hann hevur fingið veiting í 52 vikur. Metingin verður gjørd við støði í eini læknaligari meting. Metingin verður gjørd, tá umsókn um dagpening verður viðgjørd fyrstu ferð, og skal síðani gerast fyri hvørja 8. viku, at viðkomandi er sjúkraskrivaður.

Eisini eru málini í sambandi við sjálvbodna trygging umsitingarliga tyngri enn vanlig dagpengamál. Talið av persónum, sum fara at tekna trygging fer væntandi at økjast nakað.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur við sær ikki beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Dagpeningaskipanin verður meira smidlig, og tað er ein fyrimunur fyri vinnuna. Umstøður og karmar hjá smáum feløgum verða betrað, tí stjórar fáa møguleika at tekna seg til sjálvbodnu tryggingina hjá Almannaverkinum soleiðis, at stjórin er tryggjaður inntøku í sambandi við sjúku.

At persónar við útsettari pensjón fáa rætt til dagpening vegna sjúku, er við til at eggja persónum í fólkapensjónsaldri at varðveita tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og tað er ein fyrimunur fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

## 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur eina røð av jaligum avleiðingum fyri ymiskar samfelagsbólkar.

*2.1.1 Persónur, ið lýkur treytir í dagpengalógini og almannalógini*

Persónar, sum lúka treytirnar í bæði dagpengalógini og § 25, stk. 1 í almannalógini, fara frameftir at fáa veiting eftir almannalógini. Talan er ikki um nógvar borgarar. Fyri nakrar borgarar hevur broytingin ongan fíggjarligan týdning, tí veitingin er tann sama. Í báðum lógum er veitingin svarandi til lønarmiss. Men hægst møguliga veiting í dagpengalógini er umleið 20.000 kr. um mánaðin, íroknað frítíðarløn, meðan hægst møguliga veiting eftir almannalógini er 28.000 kr. um mánaðin íroknað frítíðarløn. Tað merkir, at tað verður ein fíggjarligur fyrimunur fyri borgarar, sum hava mánaðarliga inntøku hægri enn umleið 20.000 kr. um mánaðin.

*2.1.2 Framskundað pensjón og dagpeningur vegna sjúku*

Frameftir verður tað ikki gjørligt at dagpening vegna sjúku, samstundis sum ein móttekur framskundaða pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón. Persónur við framskundaðari pensjón verður við hesi broytingini javnsettur við persón við hægstu fyritíðarpensjón.

Tað hevur higartil ikki verið nakar borgari við framskundaðari pensjón, sum hevur móttikið dagpening vegna sjúku. Við broytingini verður byrgt upp fyri, at borgarar kunnu brúka skipanina til eitt endamál, sum hon ikki er ætlað til.

*2.1.3 Longt dagpeningatíðarskeið*

Broytingin fær týðandi jaligar avleiðingar fyri persónar við langtíðarsjúku. Sambært galdandi lóg missa persónar við langtíðarsjúku rætt til dagpening eftir 40 vikum. Eftir hetta kunnu teir søkja um fyribils uppihaldsveiting, sum kann vera munandi lægri. Um viðkomandi ikki lýkur treytirnar fyri fyribils uppihaldsveiting, fær hann onga almannaveiting og hevur sostatt onga inntøku. Frameftir kann dagpeningur veitast í 40 vikur í eitt 18 mánaða skeið.

Tó verður eisini møguleiki at fáa dagpening í longur enn 52 vikur. Hetta er, tá tað ikki ber til eftir 52 vikum at siga, hvønn veg sjúkan ber. T.v.s., at tað ikki ber til at siga, um persónurin verður varandi sjúkur ella aftur vinnur arbeiðsføri. Eisini persónur, sum er í viðgerð, har tað er sannlíkt at viðkomandi aftur fer at vinna arbeiðsføri, fer at fáa rætt til dagpening í longur enn 52 vikur.

Broytingarnar fara at gera tað møguligt hjá borgarum at byrja stigvíst aftur á arbeiðsmarknaðinum eftir drúgva sjúkralegu. Hesir persónar hava higartil ikki kunna brúkt ásetingina um partvíst óarbeiðsføri, um teir hava verið sjúkir í longur enn 40 vikur (sum er longst møguliga tíðarskeið í galdandi lóg).

*2.1.4 Útsett pensjón og dagpeningur*

Persónur við útsettari pensjón fær rætt til dagpening vegna sjúku. Ein persónur við útsettari pensjón, sum ikki hevur rætt til løn undir sjúku, missir í galdandi lóg ein týðandi part av síni inntøku, um hann gerst sjúkur. Frameftir fær hann rætt til dagpening eftir somu treytum, sum ein persónur, sum ikki er pensjonistur (tó er ein avmarking sett inn um, at verður tað mett

ósannlíkt at viðkomandi aftur vinnur fult arbeiðsføri, tá hann hevur verið sjúkur í 52 vikur, dettur rætturin til dagpening burtur beinanvegin).

Ein stórur partur av persónum við útsettari pensjón, hevur rætt til løn undir sjúku, og í hesum førum fær broytingin ikki týdning. Men persónurin kann blíva sagdur úr starvi eftir 120 daga regluni í starvsmannalógini, og viðkomandi kann tá fáa rætt til dagpening vegna sjúku.

*2.1.5 Stjórar í smærri feløgum*
Ein stjóri í einum felag er ikki beinleiðis fevndur av dagpengalógini, og hann hevur heldur ikki møguleika at tryggja seg hjá sjálvbodnu tryggingarskipanini hjá Almannaverkinum. Sambært galdandi lóg kann stjórin sostatt koma fyri ikki at hava nakra inntøku í sambandi við sjúku. Frameftir kunnu stjórar feløgum undir ávísum treytum tekna seg til sjálvbodnu tryggingarskipanina. Stjórin er tá tryggjaður fulla dagpeningaupphædd frá fyrsta fráverudegi, um hann gerst sjúkur.

*2.1.6 Kærumyndugleikin hevur broytt navn*
Teknisk broyting, sum ikki hevur avleiðingar í praksis.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrismanninum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Til nr. 1*
Persónur, sum lýkur treytirnar og hevur møguleika at móttaka veiting sambært § 25, stk. 1 í almannalógini, hevur ikki rætt til veiting eftir dagpengalógini. Talan er sostatt um persón, sum lýkur treytirnar í bæði dagpengalógini og í almannalógini.

*Til nr. 2 og 3*
Broytingin í mun til galdandi lóg er, at persónur faktiskt skal móttaka fólkapensjón fyri at rætturin til dagpening vegna sjúku skal detta burtur. Í higartil galdandi lóg hevur persónur, sum hevur fingið tillutað fólkapensjón, mist rættin til dagpening. Ein persónur, sum hevur útsett fólkapensjónina, hevur fingið tillutað fólkapensjón men móttekur ikki fólkapensjón. Hesin persónurin hevur, tí hann ikki móttekur fólkapensjón, sostatt rætt dagpening vegna sjúku.

Tað kunnu vera persónar føddir aftaná 1952 (og sum sostatt fáa pensjón sambært pensjónsnýskipanini), sum ikki hava útsett pensjónina, hóast inntøkan er somikið høg, at fólkapensjónin er fult mótroknað. Hesi móttaka heldur ikki fólkapensjón og hava sostatt eisini rætt til dagpening vegna sjúku.

Neyva orðingin er, at "*Hesin rættur dettur burtur frá 1. í mánaðinum eftir, at viðkomandi hevur móttikið fólkapensjón....*". Hetta skal ikki skiljast soleiðis, at um ein persónur hevur móttikið fólkapensjón einaferð, tá dettur rætturin til dagpening burtur í allar ævir. Ein persónur kann t.d. móttaka fólkapensjón og seinni velja at útseta pensjónina. Um persónurin seinni velur at útseta pensjónina, ella fær ásett pensjónina av nýggjum, soleiðis at pensjónin verður lækkað til 0, tá er ein nýggj støða, og persónurin fær tá rætt til dagpening vegna sjúku (um hann annars lýkur treytirnar í dagpengalógini).

Í higartil galdandi lóg er ásett, at rætturin til dagpening dettur burtur, tá persónur hevur fingið tillutað fólkapensjón ella er fyltur 70 ár. Aldursmarkið á 70 ár hevur seinnu árini tó ikki havt praktiskan týdning, tí so at siga ongin persónur í fólkapensjónsaldri ikki hevur fingið tillutað fólkapensjón. Sambært hesum lógaruppskoti verður aldursmarkið á 70 ár strikað. Hetta merkir, at persónur, sum ikki móttekur fólkapensjón, kann fáa rætt til dagpening vegna sjúku, hóast hann er eldri enn 70 ár.

Sambært nýggju ásetingini í § 5, stk. 3 skal Almannaverkið meta um, um tað er ósannlíkt, at persónur við útsettari pensjón, sum søkir um dagpening vegna sjúku, kann endurvinna fullan arbeiðsførleika, áðrenn hann røkkur markið ásett í § 12, stk. 2. Tað vil siga, at um persónurin verður mettur ikki at kunna endurvinna fullan arbeiðsførleika, áðrenn hann hevur verið sjúkrameldaður í 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði, dettur rætturin til dagpening burtur beinanvegin. Hetta merkir, at tað er ikki nokk, at persónurin einans hevur endurvunnið lutvísan arbeiðsførleika, og at viðkomandi brúkar ásetingina um partvíst óarbeiðsføri, tá hann røkkur markinum á 52 vikur.

Metingin skal taka støði í eini læknaligari meting, sum verður gjørd beinanvegin í sambandi við viðgerð av umsókn og skal síðani gerast, hvørja 8. viku, at viðkomandi fær dagpening vegna sjúku.

Persónur, ið hevur fingið tillutað framskundaða pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón, hevur ikki rætt til dagpening vegna sjúku. Framskundað pensjón við einum satsi svarandi til hægstu fyritíðarpensjón verður í dagpeningahøpi sostatt javnsett við hægstu fyritíðarpensjón.

*Til nr. 4*
Ásetingin í § 12, stk. 1 er óbroytt í mun til galdandi lóg. Við ásetingini í § 12, stk. 2 verður tíðarskeiðið, har dagpeningur vegna sjúku kann veitast, longt úr 40 vikum í einum 12 mánaða skeiði til 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði.

Við nýggju ásetingini í § 12, stk. 3 eru ásettar treytir fyri, nær dagpeningur kann veitast í longur enn 52 vikur. Sambært nr. 1 er tað tá persónur hevur álvarsliga ella lívshættisliga sjúku ella hevur verið fyri skaðatilburði, har tað ikki ber til at siga, um viðkomandi verður varandi sjúkur ella aftur vinnur sær arbeiðsføri. Við álvarsliga ella lívshættisliga sjúku er at skilja t.d. krabbamein, hjarta- og æðrasjúkur, seinheilaskaði o.l. Dømini eru ikki úttømandi.

Eisini persónar, sum hava verið fyri skaðatilburði og tí eru komnir somikið til skaða, at tað eftir 52 vikum ikki ber til at siga, um viðkomandi aftur vinnur arbeiðsføri, kunnu fáa dagpening í longur enn 52 vikur.

Tað er ein fortreyt fyri at koma undir treytirnar í stk. 3, nr. 1, at heilsustøðan aktuelt er álvarslig. Tað er ikki nokk, at persónurin hevur eina diagnosu, sum hevur við sær økt sannlíkindi fyri frameftir at koma í eina álvarsliga heilsustøðu.

Sambært nr. 2 kann persónur við álvarsligari ella lívshættisligari sjúku, ella sum hevur verið fyri skaðatilburði, og sum eru í viðgerð, har tað verður mett sannlíkt at viðkomandi aftur vinnur fult arbeiðsføri, fáa rætt til dagpening í longur enn 52 vikur. Tað kann vera persónur, sum hevur havt drúgva krabbasjúku, og sum fær eftirviðgerð, ella persónur, sum fær endurvenjing eftir skaðatilburð, har tað væntast at vera ein spurningur um tíð, til persónurin aftur hevur vunnið arbeiðføri.

Ásetingarnar í stk. 3, nr. 3 og stk. 4 eru óbroyttar í mun til galdandi lóg.

Í stk. 4 er ásett, at møguleiki fyri at dagpening vegna sjúku í longur enn 52 vikur í einum 18 mánaða skeiði fevnir ikki um persón í fólkapensjónsaldri.

*Til nr. 5 og 6*
Skipanin við sjálvbodnari trygging til stjórar í egnum felag verður broytt og víðkað. Sambært higartil galdandi lóg hevur skipanin verið avmarkað til stjóra í egnum felag, sum ikki hevur starvsfólk afturat sær, ella bert í lítlan mun hevur arbeiðsmegi afturat sær. Í § 14 a, stk. 1 er "egnum" strikað. Tað merkir, at stjórin kann eiga felagið saman við øðrum, ella tað kann vera ein triði persónur, sum eigur felagi.

Ásetingin í § 14, stk. 2, nr. 1 er óbroytt.

Sambært ásetingini í § 14, stk. 2, nr. 2 skal stjórin burturav ella í mestan mun hava sína inntøku frá felagnum. Við í mestan mun er at skilja, at í minsta lagi 75 % av inntøku hansara skal stava frá hansara virksemi í felagnum.

Ásetingin í § 14 a, stk. 2, nr. 3 hevur við sær, at ein stjóri, sum hevur arbeiðsmegi afturat sær, frameftir kann tekna trygging. Tryggingin er sostatt ikki avmarkað til ein stjóra. Um talan t.d. er um tveir stjórar, kunnu teir báðir tekna hvør sína trygging. Treytin er, at samlaða árliga lønarútreiðslan hjá felagnum seinasta inntøkuár í mesta lagi er 390 ferðir hægsta dagpeningaveiting um vikuna.

Tá Almannaverkið skal rokna markið fyri lønarútreiðslum, er tað nýggjasta dagpeningaupphædd, sum verður brúkt. Vanliga hækkar dagpeningaupphæddin 1. mai á hvørjum ári (onkuntíð kann tað í sambandi við sáttmálasamráðingar vera eitt sindur seinni enn 1. mai). Um ein stjóri t.d. í apríl 2022 søkir um at tekna trygging, tá er tað dagpeningaupphæddin, sum tá er galdandi, sum verður brúkt. Dagpeningaupphæddin hækkaði 1. mai í 2021 til 4.858 kr. um vikuna, og hendan upphæddin verður sannlíkt eisini galdandi í apríl 2022. Markið fyri at kunna tekna trygging er, at lønarútreiðslurnar hjá viðkomandi í 2021 ikki vóru hægri enn 390 falda 4.858, svarandi til 1.894.803 kr.

Sambært § 14 a, stk. 2, nr. 4 er rætturin til dagpening treytaður av, at stjórin ikki á annan hátt hevur rætt til løn undir sjúku. Tað er sambært lóg, sáttmála og stjórin skal ikki hava avtalað seg til rætt til løn undir sjúku.

*Til nr. 7*
Ætlandi verður løgtingslógin um Føroya Kærustovn broytt soleiðis, at virksemið verður umskipað og flutt frá kærunevndum til Føroya kærustovn. Tí skal Føroya Kærustovnur standa sum kærumyndugleiki.

**Til § 2**
Gildiskoma.

Skiftisreglan merkir, at persónur, sum er vorðin sjúkur áðrenn 1. januar 2022, og har sjúkuskeiðið ikki er liðugt, tá henda løgtingslógini kemur í gildi, er fevndur av hesi lógini. Eisini í málum, har umsókn ikki er liðugt viðgjørd, tá henda løgtingslógin kemur gildi, verður avgerð tikin sambært reglunum í hesi løgtingslógini.

Almannamálaráðið, dagfesting.

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur